Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

*Føroya Væl*

Kommunuvalið 2012 í Tórshavnar Kommunu



# VALSKRÁ

## Trivnaður og avbjóðingar



Valdagur 13. november 2012

Tórshavn tann 29. oktober 2012

# FORORÐ

Góðu borgarar í Tórshavnar Kommunu!

Málið er, at fólk skulu trívast í Tórshavnar Kommunu, og tað skal verða av-bjóðandi at liva og virka í kommununi.

Sambandsflokkurin vil skapa nøgdar borgarar.

Flokkurin ynskir at fara á val uppá at skapa ein tryggan búskap, menna vælferðina og trivnaðin og fremja økismenning í kommununi.

Búskaparvøkstur og fleiri arbeiðspláss skapa fólkavøkstur. Lágt skatta-prosent og høgur barnafrádráttur, saman við góðum trivnaðar- og sosialum tilboðum, ger kommununa áhugaverda at búgva í.

Vit eiga at skapa ein sunnan búskap, soleiðis at vit kunnu halda fast við alt tað góða, sum vit í felag hava bygt upp.

Lat okkum halda fram at menna okkara góðu kommunu.

Við Sambandsflokkinum fært tú samstarv, álit, ábyrgd og tryggleika fyri allar borgarar í Tórshavnar Kommunu.



*Vit vóna, at tú ynskir at verða við*

Vinalig heilsan

Annfinn Brekkstein
Býráðslimur fyri Sambandsflokkin í Tórshavnar Kommunu

# INNIHALD

**INNGANGUR** ........ **3**

ENDAMÁL ........ 3
VALIÐ HESAFERÐ ........ 3
FOKUSØKI, MÁLSETNINGAR OG TILTØK ........ 4
POLITISKA ARBEIÐIÐ HIGARTIL ........ 5

**POLITISKA AVBJÓÐINGIN OG BOÐSKAPIR** ........ **6**

**POLITISK VISJÓN OG STRATEGI** ........ **8**

AÐALMÁL OG STEVNA FLOKSINS ........ 8
KJARNUVIRÐI ........ 8
VISJÓN ........ 9
MÁL, STRATEGI OG POLITISKUR RÆTNINGUR ........ 9

**FOKUSØKI: BÚSKAPUR** ........ **10**

MÁL OG STRATEGI FYRI KOMMUNUBÚSKAPIN ........ 11
VINNA – MENNING OG VØKSTUR ........ 13
FÓLKAVØKSTUR - STERKARI KOMMUNA OG VINNA ........ 14

**FOKUSØKI: VÆLFERÐ OG TRIVNAÐUR** ........ **16**

MENTAN ........ 17
ALMANNAMÁL ........ 18
HEILSUMÁL ........ 18
ÚTBÚGVING ........ 19

**FOKUSØKI: ØKISMENNING** ........ **20**

ØKISMENNING – EISINI Í OKKARA KOMMUNU ........ 20

**VERKÆTLANIR OG LANGTÍÐARÆTLAN** ........ **22**

**ONNUR POLITISK MÁL** ........ **24**

ALTJÓÐAGERÐ ........ 24
UMSITING OG BYGNAÐUR ........ 24
BUSSLEIÐIN ........ 25
UMHVØRVI ........ 26
BÚSTAÐIR ........ 26
UNGDÓMUR ........ 26

**VALEVNI –** KOMMUNUVALIÐ 2012 ........ **28**

# INNGANGUR

## ENDAMÁL

Valskráin 2012 hjá Sambandsflokkinum lýsir, hvørji politisk mál, strategiir og verkætlanir flokkurin ynskir at arbeiða við og seta í verk í einum komandi 4-ára tíðarskeiði. Í valskránni eru sett upp tey mest týðandi politisku málini í Tórshavnar Kommunu, sum eiga at raðfestast høgt og loysast.

Valskráin hjá Sambandsflokkinum setur fokus á nøkur serlig øki, sum í verandi støðu og við verandi møguleikum kunnu verða við til at menna kommununa.



Valskráin leggur upp til at seta ítøkilig mál, seta mál, sum flyta mørk og sum politiskt eru realistisk at gjøgnumføra. Roynt verður at taka støði í teimum trupulleikum og avbjóðingum, sum eru í løtuni á ymsu økjunum í kommununi og vinnuni.

Valskráin eigur at síggjast í samanhangi við politiskar samstarvsmøguleikar í einum samgonguhøpi.

Sambandsflokkurin hevur roynt at tryggja sær, at politisk mál ella verkætlanir og politiskar raðfestingar eru fíggjarliga ráðiligar, faktuelt grundaðar, virðisskapandi, ambitiøsar o.a. - alt í einari hóskandi javnvág.

Politisku ætlanirnar skulu kunna lata seg gera

Valskráin skal eisini verða grundarlag fyri, hvussu flokkurin samlað profilerar og positiónerar seg á valinum.

## VALIÐ HESAFERÐ

Serliga støðan til valið hesaferð er, at Tórshavnar Kommuna komandi 8-10 árini stendur yvirfyri at gera nógvar fíggjarliga krevjandi íløgur – eitt nú í skúlar og ítróttaranlegg.

Tað kann staðfestast ein fólkaminking í Tórshavnar Kommunu, sum er nakað av tí mest álvarsliga fyri menningina.

Skuldin hjá kommununi hevur verið vaksandi seinastu umleið 3 árini og svara rentur og avdráttir í løtuni til eitt skattaprosent. Tað er nógv, sum talar fyri, við verandi leiðslu og stýring av búskapinum hjá kommununi, at henda skuldin fer at vaksa – serliga vegna stagnatión í inntøkugrundarlagnum og

stórum íløgum fyri framman. Ein avgerandi fortreyt fyri at sleppa undan óskipaðum og óneyðugum skuldarvøkstri er, at kommunan skjótast gjørligt ger eina langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur.

Tað eru farnar fram fleiri kommunusamanleggingar millum Tórshavnar Kommunu og aðrar smærri kommunur. Endamálið við samanleggingunum er at tryggja eina skjótari og betri menning av teimum kommununum, sum verða lagdar saman í eina størri kommunala eind. Fleiri av økjunum hava tørv á menning og íløgum, sum í fleiri ár eru útsettar. Sostatt má málið verða at javnstilla øll øki í kommununi antin við útbyggingum á staðnum ella við at geva lætta atgongd til allar tænastur og hentleikar í kommununi.

Hetta útgangsstøðið krevur, at Tórshavnar Kommuna fer undir at gera langtíðarætlanir fyri rakstur og íløgur, broytir nakrar av politisku raðfestingunum higartil, stovnar nakrar mennandi verkætlanir, skapar betri vinnuligar karmar o.a.

Leiðslu- og stýringaramboðini, umframt eina langtíðarætlan, eru ein vakstrarætlan fyri kommununa og ein økismenningarætlan.

## FOKUSØKI, MÁLSETNINGAR OG TILTØK

Sambandsflokkurin heldur, at skulu munagóð úrslit spyrjast burturúr politiska arbeiðinum í einum 4-ára tíðarskeiði og við verandi útgangsstøði í búskapinum, so er alneyðugt at seta politiskt fokus á øki í kommununi, sum veruliga flyta mørk, og sum kunnu geva størst nyttuvirði fyri kommununa og tess borgarar - og eisini skapa bestu búskaparligu karmarnar.

Sambandsflokkurin heldur, at tær størstu politisku avbjóðingarnar komandi árini eru innan hesi øki í kommununi - fokusøki:

- Búskapur
- Vælferð og trivnaður
- Økismenning

**Fokusøki og hornasteinar í Tórshavnar Kommunu**



Hornasteinarnir í kommununi skulu verða við til at loysa tær avbjóðingar og teir trupulleikar, sum Sambandsflokkurin hevur valt at seta fokus á – sí myndina omanfyri.

## POLITISKA ARBEIÐIÐ HIGARTIL

Sambandsflokkurin hevur í hesum valskeiðnum sitið í andstøðu. Sostatt eru tað nógvar forðingar og avmarkingar fyri, hvørji mál og úrslit kunnu náast. Hinvegin hevur umboð Sambandsfloksins roynt konstruktivt at ávirka og samstarva við samgonguna um øll týðandi mál.

Fær Sambandsflokkurin góða umboðan í Býráðið til komandi kommunuval, so er størri møguleiki fyri, at flokkurin verður partur av einari samgongu. Hetta vil flokkurin stríðast fyri til valið og vónar tí at fáa valt fleiri umboð í Býráðið.

> Sambandsflokkurin fer til Býráðsvalið uppá at gerast ein vinnari og síðan royna at gerast týðandi partur av politisku leiðsluni í kommununi

# POLITISKA AVBJÓÐINGIN OG BOÐSKAPIR

Hvat stendur Sambandsflokkurin fyri?

Sambandsflokkurin er ein liberalur, demokratiskur og sosialt sinnaður flokkur, har dentur verður lagdur á tryggan og støðugan búskap og góðar vælferðartænastur.

Hvørjar eru avbjóðingarnar og fokusøkini?

Tórshavnar Kommuna hevur í løtuni stórar politiskar, búskaparligar, mentanarligar, útbúgvingarligar og vinnuligar avbjóðingar at loysa – íløgurnar muga planleggjast betri, skuldarvøksturin tálmast, skattatrýstið skal niður, arbeiðsloysið skal minkast og skapast má í størri mun ein vinnudrivin búskaparvøkstur. Í løtuni verður virksemið og eftirspurningurin í kommunubúskapinum hildin uppi við stórum virksemisskapandi íløgum, og tískil er talan um ein óhaldbæran og ósunnan kommunubúskap. Hesir trupulleikar í kommunubúskapinum muga loysast ella kann gerast neyðugt við ógvusligum sparingum og skattahækkingum – serliga um skuldin heldur fram við at vaksa.

Sambandsflokkurin fer hesaferð til val uppá, at Tórshavnar Kommuna fær eina betri leiðslu og stýring av kommunubúskapinum, og framhaldandi kann tryggja borgarunum kommunalar kjarnutænastur innan mentan, almannamál, heilsumál og útbúgving.

Sambandsflokkurin setir fokus á hesi øki:

- **Búskapur** – skatturin lækkast, barnafrádrátturin hækkast, búskaparvøkstur, tálma skuldarvøkstrinum, minka arbeiðsloysið og fólkavøkstur
- **Vælferð og trivnaður** – ein kommuna har øll trívast og mennast
- **Økismenning** – eitt kommuna fyri øll og javnbjóðis atgongd til allar tænastur

Hvat fær veljarin afturfyri - vallyftini?

Sambandsflokkurin ætlar at seta í verk eina røð av politiskum tiltøkum, sum fara at fáa positivar avleiðingar fyri einstaka borgaran, kommununa og vinnuna.



*Búskapur*

- Kommunuskattaprosentið verður lækkað við 1 prosenti frá 1. januar 2013
- Barnafrádrátturin verður hækkaður frá 5.500 kr. til 8.000 kr. árliga
- Langtíðarætlan 2020 fyri rakstur og íløgur
- Vakstrarætlanin verður endurskoðað og knýtt til eina langtíðarætlan
- Fremja virksemisskapandi íløgur
- Skapa karmar fyri at menna verandi og nýggjar vinnur

- Fólkavøkstur fyri at skapa eitt sterkari kommunu og vinnu

*Kjarnuvælferð*

<u>Mentan</u>
- Nýggjan musikkskúla
- Hýsan av Oyggjaleikunum
- Umvælingin av ítróttarhøllini á Hálsi gerast liðug í 2013
- Nýggj høli til Tjóðpall Føroya – ávirka og samstarva við landsmyndugleik-arnar

<u>Almannaøkið</u>
- Nøkta tørvin á ellisheimum

<u>Heilsuøkið</u>
- Byggja læknamiðstøð
- Skúlakantinur

<u>Útbúgving</u>
- Fleiri hægri útbúgvingar til høvuðsstaðin
- Íløgur í kt-útgerð til fólkaskúlan – menna/dagføra skúlarnar
- Størri og dygdarbetri skúlaeindir

*Økismenning*
- Íløgur í infrakervið – vegir og brýr
- Íløgur í barnagarð
- Bíligari grundstykki

*Onnur politisk mál*



- Fremja átøk ímóti umhvørvisdálking – í altjóða samstarvi
- Fleiri bústaðarmøguleikar
- Betri karmar fyri ungdómin at útbúgva seg og útvega bústað

Sambandsflokkurin fer at gera hesi frával:

- Kjarnuvælferðartænastur verða ikki skerdar
- Kommunan skal ikki eiga í og reka fyritøkur ella reka virksemi, sum best verður rikið á privat-vinnuligum grundarlag

# POLITISK VISJÓN OG STRATEGI

## AÐALMÁL OG STEVNA FLOKSINS

Sambandsflokkurin er ein demokratiskur, liberalur og sosialt sinnaður flokkur, har dentur verður lagdur á tryggan og støðugan búskap og góðar vælferðartænastur. Sambandsflokkurin heldur, at ein vinnudrivin búskaparvøkstur er besta grundarlagið fyri einum sterkum samfelagsbúskapi, herundir inntøkum hjá kommununi og dygdargóðum kommunalum tænastum.

*Liberali parturin* av stevnuni ábyrgdar flokkin at geva vinnulívinum betri møguleikar at vinna pengar og menna vinnuna til at fíggja vælferðina:

- Skapa karmar fyri vinnuliga menning í kommununi
- Minka um skattatrýstið.

*Sosiali parturin* av stevnuni ábyrgdar flokkin at menna vælferðina:

- Góðir barnagarðar, vøggustovur, frítíðarskúlar og fólkaskúlar
- Virkin ungdómur, sum fær góðar møguleikar at trívast og mennast
- Virðiligur og virkin aldurdómur í góðum og tryggum hondum
- Sosialt netverk, ið loftar teimum veikastu, um tey snáva.

## KJARNUVIRÐI

Sambandsflokkurin ynskir í øllum sínum politiska virksemi at arbeiða útfrá hesum politisku kjarnuvirðum:

- Demokrati - luttøka og ávirkan hjá tí einstaka borgaranum
- Frælsi - tali- og skrivifrælsi
- Javnrættindi - eitt samfelag fyri øll
- Javnstøða - eins umboðan, eins løn fyri sama arbeiði
- Rættartrygd - røtt og skipað viðgerð fyri allar borgarar og stórt gjøgnumskygni
- Demokratisk vælferðarskipan - eitt samfelag, har øll kunnu mennast og trívast
- Álit - skapa trúvirði á politisku skipanina
- Trivnaður - mennandi at liva og virka í kommununi, ríkt mentanarlív
- Tryggleiki - góðar sosialar-, heilsuligar- og útbúgvingarligar skipanir
- Samstarv – millum politikarar, millum flokkar og millum lond.

Ofta taka vit hesi politisku kjarnuvirði sum eina sjálvfylgju, men Sambandsflokkurin heldur, at tað er neyðugt alla tíðina at eftirmeta kjarnuvirðini og royna at geva teimum veruligt innihald. Sambandsflokkurin heldur, at m.a. eitt vælvirkandi mentanarlív kann verða við til at stuðla undir politisku kjarnuvirðini.

## VISJÓN

Politiska visjónin hjá Sambandsflokkinum skal tryggja, at allir borgarar í kommununi fáa tær tænastur og ta hjálp teimum tørvar og gerast nøgdir borgarar. Harafturat skal vinnan fáa greiðar og mennandi karmar at virka í.



- Menningin í Tórshavnar Kommunu skal verða á sama støði sum í okkara í grannalondum og annars teimum framkomnu kommunum, sum vit vilja samanberast við
- Kommunan skal verða eitt stað, har fólk trívast, mennast og hava avbjóðingar
- Vinnan skal verða kappingarfør og skapast skulu karmar fyri menning, búskaparvøkstri og íverksetan

Sambandsflokkurin heldur, at henda politiska visjónin hevur m.a. við sær, at setast skulu í verk nøkur leiðslulig, strategisk og búskaparlig tiltøk og handlingar. Kommunan og vinnan noyðast at fara undir nakrar strategiskar ætlanir, td. orða eina langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur, vakstrarætlan og økismenningarætlan.

Kommunan eigur at fremja bygnaðarbroytingar og umleggingar í umsitingini, tænastum, stovnum og skipanum, og seta brúkaran í fokus við dygdargóðum tænastum.

Gerast skulu nakrar politiskar og búskaparligar raðfestingar, sum kunnu verða við til at tryggja, at visjónin kann náast og at skapt verða munagóð úrslit.

## MÁL, STRATEGI OG POLITISKUR RÆTNINGUR

Sambandsflokkurin hevur við verandi útgangsstøði í kommunubúskapinum og vinnuni, valt eina politiska strategi, har fokus verður sett á búskap, vælferð og trivna og økismenning. Í høvuðsheitum gongur strategiin út uppá at skapa inntøkur frá menning og búskaparvøkstri í vinnuni og umleggingum í kommunalu umsitingini, strekkja íløgurnar yvir eitt sindur longri áramál og at henda inntøkuskapan og leysgeving av tilfeingi, síðan skal verða við til at fíggja størri íløgur, tryggja lægri skattatrýst og tryggja vælferðina í kommununi. Politisk átøk fyri at menna kommunala búskapin eiga eisini at verða við til at skapa fólkavøkstur.

# FOKUSØKI: BÚSKAPUR

Inngangur og støðulýsing

Tórshavnar Kommuna eigur at leggja eina búskaparstrategi, sum uppá styttri sikt er við til at optimera kommunubúskapin og sum uppá longri sikt kann tryggja nakrar sunnar javnvágir við meira varandi vøkstri - skaptur í størri mun frá vinnuligum virksemi. Kommunan eigur eisini at rationalisera í umsitingini og harvið leysgeva tilfeingið til tænastur beinleiðis til borgaran.

Búskapurin í Tórshavnar Kommunu er ávirkaður av gongdini ella sveiggj-unum í samfelagsbúskapinum – kortini hevur kommunan sum høvuðsstaður eitt støðugt og trygt inntøkugrundarlag, í og við, at flestu almennu stovnar hava bústað í Tórshavnar Kommunu.

Skuldin hjá kommununi er seinastu 3-4 árini vaksin til 200 mió.kr. ultimo 2012, íroknað lántøku uppá 50 mió.kr. til gjaldføri - svarandi til umleið 30% av einari álíkning. Hesin skuldarvøkstur hevur m.a. við sær, at avdráttir og rentur í løtuni svara til umleið eitt heilt kommunuskattaprosent ella umleið 30 mió.kr. Samstundis sum skuldin veksur, hækka rentuútreiðslurnar skjótt. Ein vaksandi skuld minkar munandi um handlifrælsið hjá kommununi og verða ongi inntriv gjørd fyri at tálma vøkstrinum, er vandi fyri skattahækk-ingum ella ógvusligum sparingum á fíggjarætlanini.

Samstundis sum kommunan hevur eitt gott og støðugt inntøkugrundarlag er skattaprosentið hækkað tvær ferðir - í 2006 og 2010 við tilsamans 2 prosentstigum. Seinnu ferðina skuldi hækkingin brúkast til at fíggja Boða-nesheimið og lovað varð, at tað skuldi lækkast aftur, tá heimið varð liðugt. Tað er tí eitt lyftisbrot um skattaprosenið ikki lækkar í sambandi við fíggjar-ætlanina fyri 2013



Tað fyriliggja ongar metingar av búskaparvøkstrinum í Tórs-havnar Kommunu, men virksemi verður í høvuðsheitum skapt ella stimulerað við kommunalum íløgum og almennum lønum. Talan er sostatt ikki um ein búskaparvøkstur, sum í nóg stóran mun er skaptur í vinnuni.

Landsbankin metir, at BTÚ í ársins prísum í 2012 og 2013 veksur ávika-vist 2,5% og 3,6%, og við einum miðal vøkstri í brúkaraprístalinum á 2,5% merkir tað stagnatión í 2012 og lítil realur vøkstur í 2013.

Arbeiðsloysið hevur seinastu árini verið 6-7% uppá landsplan. Í Streym-oynni var arbeiðsloysið umleið 900 fólk - uppgjørt í feb. 2012.

Harafturat kann staðfestast, at fólkatalið í Tórshavnar Kommunu er í minking.

Árligi íløgukarmurin varð td. í 2010 uppá heilar 276,7 mió.kr. Tað hava tí verði trupulleikar at gjøgnumføra so nógvar íløgur og verkætlanir - og ongin langtíðarætlan er at halda seg til. Talan er á ein hátt um oysl við almennum peningi og um "skuffuverkætlanir", smáar og stórar verkætlanir, sum ikki verða lidnar og ikki tilføra nyttuvirði til borgaran. Dømið: 80 mió.kr. lagdar í Skarðshjalla og vinnustykki á Karlamagnusarbreyt – ov optimiskt og vantandi varsemi – deyður kapitalur.

Kommunan ger í løtuni ikki langtíðarætlanir fyri rakstur og íløgur, sum td. er við til at skapa meira stabil viðurskifti, eitt nú støðugt skattaprosent og eina javna menning.

Tórshavnar Kommuna setti í verk í 2010 eina vakstrarætlan, men henda ætlan er ongantíð veruliga fylgd, onki ítøkiligt er gjørt fyri at fylgja hesari ætlan og tí eru heldar ongar eftirmetingar gjørdar. Tað er í hesum sambandi ikki gjørd ein langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur, sum er knýtt til hesa vakstrarætlan um mál og politisku visjónina, "at høvuðsstaðurin verður ein **Vakstrardepil í Norðuratlantshavi**."

## MÁL OG STRATEGI FYRI KOMMUNUBÚSKAPIN



Ein avgerandi fortreyt fyri, at kommunan kann veita kappingarførar vælferðartænastur og virka væl, er ein vinnulig inntøkuskapan og búskaparvøkstur og harvið hægri skattainntøkur til kommunukassan.

Tí er neyðugt, at røttu og bestu karmarnir verða skaptir fyri at reka vinnuligt virksemi, menna verandi vinnur, skapa nýggjar vinnur o.a.

Grundleggjandi meginreglan hjá Sambandsflokkinum er at føra ein ábyrgdarfullan búskaparpolitikk og eina fíggjar- og búskaparstýring, sum hevur við sær, at kommunan skal veita bíligar, effektivar og dygdargóðar tænastur. Ein kommunalur rakstur við óneyðugum skrivstovuveldi, skal minkast til fyrimuns fyri betri og fleiri vælferðartænastur.

> Sambandsflokkurin ynskir, hvørja ferð ein politisk avgerð skal takast, at hugsast skal um búskap og effektivitet, produktivitet og sparsemi

Búskaparpolitikkurin skal vera álitisvekjandi, og sveiggini í kommunubúskapinum skulu tálmast við einum aktivum fíggjarpolitikki. Í tíðum við lágkonjunkturi skal førast ein virksemis- og arbeiðsskapandi politikkur, og ein tálmandi fíggjarpolitikkur skal rekast í tíðum við hákonjunkturi.

Ein tryggur kommunubúskapur við lágari skuld og hóskandi raðfestingum í rakstri og íløgum skapar handlifrælsi. Og ein kommuna við fíggjarligum handlifrælsi kann arbeiða við menning og vøkstri.

**Talva 1. Fíggjar- og búskaparpolitikkur 2013-20**

| Málsetningar og tiltøk |
|---|
| *Mál uppá styttri sikt* |
| • Skattatrýstið verður lækkað<br>• Fíggjarligur lætti til barnafamiljurnar – hægri barnafrádrátt<br>• Játtanir til rakstur og íløgur skulu haldast<br>• Íløgurnar skulu setast realistiskt<br>• Íløgur verða gjørdar í virksemis- og arbeiðsskapandi tiltøk og mennandi verkætlanir<br>• Rationaliseringar og sparingar verða framdar í umsitingini<br>• Tryggja effektiva kapping um kommunalar verkætlanir, íløgur og uppgávur<br>• Gjaldførið hjá kommununi verður endurstovnað og varðveitt |
| **Tiltøk**<br>• Kommunuskattaprosentið verður í fíggjarætlanin fyri 2013 lækkað við 1%<br>• Barnafrádrátturin hækkast við 2.500 kr. Í 2013 – frá 5.500 kr. til 8.000 kr. árliga<br>• Styrkja játtanareftirlitið og leypandi roknskaparrapporteringina<br>• Kommunan ger langtíðarfíggjarætlan fyri rakstur og íløgur – játtanarkarmar 2020<br>• Raðfesting av íløgum til viðlíkahald og menning av infrakervinum, anlegg o.a.<br>• Avmarkingar verða gjørdar fyri, hvussu stóra skuld kommunan kann loyva sær<br>• Gjaldførið verður ásett til 10% av árligu inntøkunum |
| *Mál uppá longri sikt* |
| • Lágt og støðugt skattatrýst<br>• Skattaskipanin skal stuðla undir búskaparvøkstur og skapan av arbeiðsplássum<br>• Afturgjald av skuld<br>• Deildirnar í umsitingini skulu fremja rationaliseringar - byrjað verður í 2013 – verkætlanir<br>• Niðurlaging av øllum kappingaravlagandi stuðli o.a. |
| **Tiltøk**<br>• Langtíðarætlan fyri rakstur, íløgur og gjaldføri<br>• Breiðar politiskar semjur og raðfestingar fyri kommunubúskapin |

## Skattalækking 2013

Visti tú - alt annað líkað - at eitt prosent í skatttalækking fyri ein persón og eitt húski merkir ávikavist:

- Ársinntøka uppá 250 tús.kr. fyri ein persón - ein skattalækking uppá 1% svarar til 2.300 kr. árliga meira at ráða yvir og
- Eitt húski við einari ársinntøku uppá 500 tús.kr. - ein skattalækking uppá 1% svarar til 4.600 kr. árliga meira at ráða yvir.

Búskapurin hjá Tórshavnar Kommunu tolir væl eina skattalækking við tí góða inntøkugrundarlag, sum høvuðsstaðurin hevur - eisini uppá sikt. Hetta kann eisini gerast uttan, at tænastustøðið lækkar.

Hvussu skal ein skattalækking ella árlig inntøkuminking uppá umleið 30 mió.kr. fíggjast – td. fylgjandi:

- Skerja íløgurnar - 20 mió.kr. árliga
- Inntøkuvøkstur frá øktum vinnuligum virksemi og arbeiði – 5 mió.kr. í partafelagsskatti
- Sparingar í rakstrinum og efffektivisering – 5 mió.kr.

## VINNA – MENNING OG VØKSTUR

*Útbjóðing av kommunalum tænastum*

Tórshavnar Kommuna eigur at bjóða út kommunalar tænastur til privatar at røkja og viðlíkahalda, har tað er ein tænastuligur og fíggjarligur fyrimunur.

*Vinnuøki*

Rudda upp og skipa vinnuøkini professionelt og innbjóðandi – td. við Velbastaðvegin. Hetta er við til at skapa øktan aktivitet vegna tað, at økini gerast attraktivt fyri kundar og vinnurekandi. Kommunan skal hava ein aktivan leiklut við at hjálpa ognarunum til at skipa økini og skapa røttu karmarnar.

*Brennistøðin á Hjalla*

Gjaldið hjá vinnuni fyri burturkast skal lækkast til frama fyri økt vinnuligt virksemi.

*Vakstrarætlan fyri Tórshavnar Kommunu*

Ein vakstrarætlan fyri kommununa skal m.a. verða við til at tryggja ein vinnudrivan vøkstur, skapa fólkavøkstur, tryggja ríkt mentanarlív, fremja altjóðagerð o.a.

Verandi vakstrarætlan fyri Tórshavnar Kommunu (høvuðsstaðurin ein VakstrarDepil í Norðuratlantshavi) verður endurskoðað og lagað til tær nýggjastu avbjóðingarnar, sum standa fyri framman. Sett verða upp ítøkilig stutt- og langtíðarmál fyri vakstrarætlanina. Harafturat verða sett upp ítøkilig tiltøk, sum skulu til fyri at gera visjónina til veruleika.

Vakstrarætlanin verður td. at hava tætt tilknýtið til langartíðarætlanir fyri rakstur og íløgur og ein økismenningarætlan. Hetta skal skapa størri trygd fyri, at málini verða nádd og politiska trúvirðið økt.

## FÓLKAVØKSTUR - STERKARI KOMMUNA OG VINNA

Málsetningar

Tað er tørvur á fólkavøkstri í Føroyum við tí endamáli at styrkja og framtíðartryggja samfelagið og vinnuna. Tørvur er á einum fólkagrundarlag, sum er sett saman á hóskandi og burðardyggan hátt eftir aldri, kyni, førleikum osfv. Fólkagrundarlagið í Tórshavn er í løtuni m.a. eyðkent við:




- 20.000 íbúgvar, umleið
- Arbeiðsmegin er støðug, men ov fá yngri arbeiðsfør fólk
- Færri kvinnur enn menn búgva í kommununi
- Framskrivingar vísa, at talið á eldri fólkum ella pensjónistum fer at vaksa munandi um nøkur fá ár
- Bara ein triðingur av teimum, sum taka eina hægri útbúgving venda aftur til Føroya/Tórshavn/Miðstaðarøkið
- Lutfalsliga fá við hægri útbúgving starvast í vinnuni

Avbjóðingin fyri land og kommunur er at forða fyri framhaldandi fráflytning og at skapa karmar fyri, at arbeiðsføri parturin av fólkinum og unga fólki velur at flyta til Føroyar aftur eftir loknað útbúgving og arbeiðsroyndir í útlandinum.

> Ein kommuna í fólkaminking og uttan fólk við fjølbroyttum førleikum, skapanarevnum og íverksetarum, kann ikki mennast

Høvuðsfortreytin hjá unga útbúna fólkinum fyri at venda aftur til Føroya ella at verða verandi, er búskaparvøkstur, tvs. skapan av lokkandi arbeiðsplássum, bæði í vinnuni og hjá tí almenna. Harafturat muga sosialar skipanir og vælferðartænastur verða so mikið útbygdar og vælvirkandi, at familjur við børnum, lætt og fyri ein rímuligan pening, kunnu festa búgv og trívast í kommununi.

Ein búskaparvøkstur ella hákonjunkturur hevur við sær størri tilflyting til eitt øki – hetta er kortini ikki útgangsstøðan hjá høvuðsstaðnum í løtuni, og tí skulu serlig tiltøk til fyri at skapa búskaparmenning og síðan fólkavøkstur.

Tiltøk

*Styttri sikt, 3-10 ár*

- Kommunalar virksemisskapandi íløgur og verkætlanir
- Íverksetarakarmar o.a.

*Longri sikt, 10-20 ár*

- Vinnustrategi og vakstrarætlan fyri vinnuna

- Menna lokkandi og kappingarfør arbeiðspláss og møguleikar fyri altjóða yrkisleið
- Fleiri hægri strategiskar útbúgvingar verða settar á stovn í Tórshavn
- Støðugar og góðar vælferðartænastur og sosialar skipanir, fleiri bústaðarmøguleikar o.a.
- Menna mentanartilboð

Politiskar raðfestingar

Tað er frá vinnuni, at vælstandurin og síðan vælferðin hjá kommununi skal koma, og tí er neyðugt at fáa vinnuna at vaksa og kasta av sær meira pening. Sambandsflokkurin ynskir at seta fokus á eina vakstrarætlan fyri at skapa fleiri arbeiðspláss og trekkja fólk til landið og kommununa.

Harafturat er neyðugt við einari skattalækking fyri at stimbra privatbúskapin og harvið eisini vinnuliga virksemi og kommunala búskapin.

Tað eiga at verða gjørdar betri og meira gagnligar raðfestingar fyri rakstur og íløgur. Tí verður neyðugt at gera eina langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur, hvørs fyrimunir verða, at nakrar av størri íløgunum veruliga kunnu gjøgnumførast og soleiðis, at í framtíðini verður tamarhald á rakstrarútreiðslunum og skuldini.

# FOKUSØKI: VÆLFERÐ OG TRIVNAÐUR

Inngangur og støðulýsing

Sambandsflokkurin vil eftir búskaparligum evnum og orku hjá kommununi verða við til at tryggja øllum borgarum tær vælferðartænastur, sum álagdar eru kommununi at byggja upp og røkja, og føra ein virðispolitikk, sum gevur høga lívsdygd. Tær vælferðartænastur, sum kommunan hevur ábyrgdina av er td.:

- Kvøld- og ungdómsskúlar
- Ungdómshús
- Svimjihallir
- Ítróttarhallir
- Bygging av fólkaskúlum
- Bygging av ellis- og røktarheimum
- Barnagarðar, frítíðarstovnar og vøggustovnur
- Annað

Í løtuni eru nógvar vælferðartænastur undir trýsti vegna vantandi búskaparvøkstur, stórt íløguvirksemi og vaksandi útreiðslur til umsiting, og tí verður talan ikki um at býta út nýggjar kostnaðarmiklar tænastur, men heldur royna at skipa kommunala geiran og tess tænastur meira rationelt og effektivt, leysgeva óneyðugt tilfeingi og raðfesta øðrvísi – stutt sagt fáa meira fyri minni.

*Mentan og trivnaður*

Tað er tørvur á einum aktivitetshúsi til ungdómar og listafólk: tónleikur, málningalist, mekaniskur verkstaður og annað kreativt til ungdómin.

Ítróttarhøllin á Nabb er í ringum standi. Hevur verið í hesum standi alt ov leingi og er við at missa status sum eitt trekkplástur – lappaloysnir hevur verið eyðkennið eftir yvirtøkuna frá ítróttarfeløgunum. Gjørd er ein heildarloysn, sum ikki hevur fingið fígging ella nóg stóra játtan.

Á Velbastað og í Nólsoy gongur seyðurin leysur í bygdunum um veturin og oyðileggur havar og urtagarðar. Tað er ikki gjørdur skilnaður millum búseting og seyðahald enn í nøkrum av bygdunum – vantandi politiskur meirluti fyri at játta pening.

*Almannamál*

Tørvurin á røktarheimsplássum í 2012 er umleið 60-70.

Tað er enn eitt ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu, sum hevur við sær, at menningin á ymsu økjunum steðgar upp ella verður fleiri ár seinkað.

*Heilsumál*

Nakrir av kommunulæknunum virka í løtuni í leigaðum hølum. Kommunan eigur ístaðin sjálv at byggja og reka læknamiðstøðir.

Fleiri av verandi skúlum hava onga kantinu umframt, at nýggir skúlar heldur ikki hava slíkar umstøður – talan er her um skeiva raðfesting og vantandi framskygni.

*Útbúgving*

Tað er neyðugt hjá kvøldskúlunum at fylgja við menningini og veita viðkomandi tilboð til borgaran.

Á fólkaskúlaøkinum eru nakrir av bygningunum vorðnir gamlir og treingja til ábøtur somuleiðis sum tørvur er á nýbygging – td. Kommunuskúlin.

Tað er eisini ójavnt tøkniligt støðið á útgerð í fólkaskúlunum, herundir telduútbúnaði til undirvísing.

**MENTAN**

<u>Málsetningar</u>



Sambandsflokkurin ynskir at styrkja mentanararvin fyri at varðveita tað virðismikla í føroyskari mentan og samleika.

Harafturat ynskir flokkurin at menna listina við at skapa góðar karmar fyri listafólk og harvið geva møguleikar fyri nýskapandi mentan og list í høvuðsstaðnum og í ymsu økjunum. Mentan fevnir her eisini um ítrótt, tónleik o.a.

<u>Tiltøk</u>

*Stutt sikt*

- Bygging av musikkskúla
- Ítróttarhøllin á hálsi verður umvæld og arbeiðið gjørt liðugt
- Gjørdar verða nakrar tørvsmetingar um skúlabygging
- Altjóða marknaðarførsla av føroyskari tónleikavinnu

*Langt sikt*

- Fyrireikingar og bygging av langhyli
- Aktivitetshús til ungdómar og listafólk: tónleikur, málningalist, mekaniskur verkstaður og annað kreativt til ungdómin

- Fyrireikingar og íløgur til Oyggjaleikirnar

## ALMANNAMÁL



Málsetningar

Høvuðsuppgávan hjá Tórshavnar Kommunu á almannaøkinum er at byggja og reka ellis- og røktarheim. Málið er at fáa burtur allar bíðilistar.

Málið er annars at varðveita og menna verandi tænastur til almannamál.

Tiltøk

Gjørdar verða nakrar metingar um tørvin á fleiri ellis- og røktarheims-plássum.

Lætt atkomuligt til allar kommunalar bygningar.

Ávirka landsmyndugleikarnar at gera eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdar-býtið soleiðis, at kommunan td. bæði tryggjar íløgur og rakstur, sum kann tæna borgarunum í nærumhvørvinum (peningurin skal fylgja við frá landi-num).

## HEILSUMÁL



Málsetningar

Býráðið eigur at raðfesta heilsu og trivna høgt í kommununi. Kommunala heilsuøkið fevnir m.a. um hesi øki:

- Kommunulæknar
- Børn, ung og eldri
- Fólkaheilsa

Gera umstøðurnar á skúlunum og øðrum kommunalum stovnum soleiðis, at tað er møguligt at fáa heilsugóðan mat. Íløgur eiga at gerast á skúlunum í kantinur ella onnur líknandi felags øki. Hetta fer at hava við sær betri trivna og harvið eisini eina betri innlæring.

Tiltøk

- Íløgur í egnar læknamiðstøðir
- Íløgur í skúlakantinur – nýggir og verandi skúlar
- Fleiri aktivitets- og fríðtíðartilboð til pensjónistar í høvuðsstaðnum. Sosial-ur felagskapur stimbrar og skapar lívsdygd

## ÚTBÚGVING



Málsetningar

Tað er neyðugt, at kvøldskúlin fær tilfeingi at fylgja við menningini, bæði hvat viðvíkur útbúgvingartilboðum til so breiða fjøld sum gjørligt og fær tíðarhóskandi undirvísingaramboð (KT-amboð).

Nýggir og eldri skúlar eiga at javnstillast við tøkniligari útgerð, herundir telduútbúnaði til undirvísing.

Tað eiga at verða bygdir kommunuskúlar eftir tørvi. Í hesum sambandi eigur kommunan at skipa skúlarnar í stórar eindir.

Tiltøk

- Íverksetan verður fastur partur av undirvísingini í fólkaskúlunum og miðnámsskúlunum
- *Fróðskaparsetrið*: Leggja størri dent á vinnuligar/merkantilar útbúgvingar, aljtóða samstarv o.a. – ávirka skúlamyndugleikarnar
- *Sjómansskúlin:* Verður undir ongum umstøðum niðurlagaður og fluttur til annað øki í landinum. Framhaldandi at virka fyri, at Sjómansskúlin fær bestu karmarnar at virka har, sum hesin er. Endamálið er at halda fast við okkara ungu við einum vælvirkandi Sjómansskúla og sum tryggjar okkum vinnuligu menningina innan sjóvinnuna, sum ein siglandi tjóð hevur tørv á – ávirka skúlamyndugleikarnar
- *Fólkaskúlin:* Íløgur gerast soleiðis, at tøkniliga støðið verður eins á skúlunum – allir næmingar verða líkastillaðir, hvat kunningartøkni viðvíkur á hvørjum skúla. Fólkaskúlin verður skipaður í størri skúlaeindir
- *Kvøldskúlin:* Varðveita og styrkja kvøldskúlaskipanina – stórt og dekkandi útboð til borgararnar. Nýggj tilboð, sum skulu hóska til ymiskleikan og til tað rákið, sum til eina og hvørja tíð rørir seg í býnum

Politiskar raðfestingar

Vælferðartænasturnar hjá kommununi ella bleytu virðini eru ein høvuðsfortreyt fyri at skapa trivna.

Útbúgving er sera týdningarmikil fyri menningina av samfelagnum og vinnuni. Útbúgving hevur td. týdning fyri búskaparvøkstur, íverksetan, dygdarmenning í fiskivinnuni, almennar vælferðartænastur, menning av nýggjum útflutningsvinnum o.a.

Politisku myndugleikarnir skulu skapa fíggjarligu- og mentunarligu karmarnar, og ikki stýra listini - tað er uppgávan hjá fakfólki. Listin skal stuðlast av bæði tí almenna (landi og kommunum) og tí privata fyri, at hon ikki bara skal verða treytað av einari fíggingarkeldu.

# FOKUSØKI: ØKISMENNING

Inngangur og støðulýsing

Tórshavnar Kommuna er sett saman av fleiri økjum, sum fyrr vórðu sjálvstøðugar kommunalar eindir. Hetta hevur við sær, at kommunan má gera eina skipaða ætlan fyri, at øll øki í kommununi fáa gagn og nyttu av samanlegging, og fáa javnbjóðis møguleikar og atgongd til kommunalar tænastur og skipanir.

Økismenning snýr seg um at menna øll øki í kommununi serliga eftir, at fleiri samanleggingar eru framdar og at kommunan er vaksin nógv seinastu árini. Endamálið er at javnstilla økini í kommununi antin við útbyggingum og menning á staðnum ella við lættari og skjótari atgongd til tænastur og skipanir aðra staðnis í kommununi.

Tórshavnar Kommuna fevnir um hesi øki og partar:

- Havnin – miðøki
- Argir
- Hoyvík
- Kollafjørður
- Nólsoy
- Kaldbak
- Velbastaður – Syðradalur og Norðadalur
- Kirkjubøur
- Hestir/Koltur

Tað fyriliggur ongin greið ætlan fyri, hvussu Tórshavnar Kommuna eigur at menna økini í kommununi. Hetta hevur m.a. við sær, at økini/bygdirnar verða mentar ójavnt og meira tilvildarliga ella tá størri trupulleikar íkoma og kommunan verður tvungin at gera eina íløgu o.a.

### ØKISMENNING – EISINI Í OKKARA KOMMUNU

Málsetningar

Tað er ongin sjálvfylgja, at bara smærri kommunur verða lagdar saman við aðra størri kommunu, ja so gerast tænasturnar betri, fleiri íløgur í bygningar, vegir o.a. Tað skal gerast ein virkin innsatsur fyri at skapa verulig úrslit, herundir setast greið mál og leggjast ein strategi.

Málsetningurin innan økismenning er fylgjandi:

- Javnastilla og menna øll økini mest møguligt komandi 5 árini
- Geva lætta og skjóta atgongd til felags kommunalar tænastur

Tað eigur í hesum sambandi at verða gjørd ein serlig ætlan fyri økismenning í Tórshavnar Kommunu – ein Økismenningarætlan.

**Talva 2. Økismenning 2013-20**

| **Málsetningar og tiltøk** |
| --- |
| *Mál uppá styttri og longri sikt – 0-4 ár* |
| **Økismenningarætlan**<br>• Gjørd verður ein økismenningarætlan fyri komandi 2-4 árini |
| **Tiltøk**<br>• **Havnin/miðøki** – musikkskúla, langhyl, multi-arena/stórhøll, oyggjaleikir<br>• **Argir** – brúgv um Sandá<br>• **Hoyvík** - fótboltsvøll<br>• **Kollafjørður** - nýggjan barnagarð í 2013-2014, fleiri grundstykkir, økta vatngoymslu<br>• **Nólsoy** - fleiri bíligari grundstykki, vetrarfriðing<br>• **Kaldbak**<br>• **Velbastaður** /Syðradalur og Norðadalur – betri og tryggari vegakervi<br>• **Kirkjubøur**<br>• **Hestur/Koltur**<br><br>Hesar íløguætlanir kunnu bara lata seg gera fíggjarliga og fremjast innan eitt 5-8 ára tíðarskeið við, at gjørd verður ein langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur.<br><br>Harumframt má gerast ein Vakstrarætlan og ein Økismenningarætlan. |

## Politiskar raðfestingar

Tað er ikki nóg mikið at leggja kommunur saman og síðan ganga út frá, at menningin kemur av sær sjálvum. Royndirnar vísa, at skulu fyrimunir og góð úrslit fáast frá samanlegging, so skal leggjast ein ætlan – setast ítøkilig mál og leggjast ein strategi. Tí er sera neyðugt, fyri, at økini ikki skulu verða fyri ójavnari menning og afturstigi, at gjørd verður ein ætlan fyri økismenning í kommununi.

# VERKÆTLANIR OG LANGTÍÐARÆTLAN

Inngangur og støðulýsing

Tórshavnar Kommuna hevur ætlanir um at fyrireika og gera nógvar størri og smærri íløgur. Talan er m.a. um størri verkætlanir, sum hava við sær menningarlop fyri kommununa og kunnu flyta mørk – í mun til vanligan rakstur og tillagingar. Í hesum sambandi eigur kommunan at gera neyðugar raðfestingar av verkætlanum – treytað av nyttuvirði fyri borgaran og vinnuna, kostnaður o.a.

Í løtuni hevur kommunan onga langtíðarætlan fyri íløgur. Íløgurnar verða framdar og settar á fíggjarætlanina uttan at tryggja, at heildin hongur nóg væl saman. Íløgurnar verða fleiri gjørdar, tá kommunan verður tvungin at handla ella td. tá fleiri anlegg øll eru við at gerast gomul í senn.

Málsetningar

Málsetningurin við at seta í verk størri og smærri verkætlanir er m.a.:

- Menna ein kappingarføran høvuðsstað
- Menna kommununa sum heild og økini
- Skapa størri trivna

**Talva 3. Verkætlanir og langtíðarætlan 2013-20**

| **Málsetningar og tiltøk** |
|---|
| *Mál uppá styttri og longri sikt – 0-8 ár* |
| Talan er um hesar verkætlanir og íløgur - menningarlop:<br>• Musikkskúli – 55 mió.kr.<br>• Nýggjan Vesturskúla – 250 mió.kr.<br>• 50 m. langhyl – 80 mió.kr.<br>• Innandurða fótbóltshøll/multi-arena – 60 mió.kr. / 120 mió.kr.<br>• Umvælingin av høllini á Hálsi heldur áfram – 8 mió.kr.<br>• Fótbólsvøllur í Hoyvík – 5 mió.kr.<br>• Brúgv yvir Sandá – 45 mió.kr.<br>• Fyrireika og skapa karmar fyri Oyggjaleikirnar í 2019 – 30-60 mió.kr.<br>• Skipan og fríðkan av býnum – 10 mió.kr.<br>• Bátadrátt í Álagerði – 1,2 mió.kr.<br>• Skipan av umhvørvi – eitt nú fjallagøtur millum bygdir og býar-partar (reiðfólk, hundafólk og borgarar – trivnaðarátak – 6 mió.kr.<br>• Aktivitetsøki til hundaeigarar – 1 mió.kr.<br>• Viðvirka til nýggjan Tjóðpall – hýsa hesum í Tórshavnar Kommunu ella høvuðsstaðnum<br>• Aktivitetshús til ungdómar og listafólk: tónleikur, málningalist, mekaniskur verkstaður og annað kreativt til ungdómin – 5 mió.kr.<br>• Fríðkan av havnalagnum í Nólsoy frá Klivum og heim á Traðbrúgv, eitt nú betra um keikantin. |

Seta upp gøtuljós, betra um ferðsluviðurskiftini (asfaltering) og økja um sandstrondina. Harafturat viðvirka at betra mentan og trivnaðin í Nólsoy: stuðla einari umbygging av Royndarhúsinum, eitt nú betra um atkomumøguleikarnar hjá eldri og rørslutarnaðum fólki. Royndarhúsið hevur stóran týdning fyri mentanarlív og trivnaðin vetrarhálvuna. Arbeiðið at gera brimverju fram við Bakkavegnum heldur fram – 1 mió.kr.

- Velbastaður: Endalig loysn á ferðsluviðurskiftunum á Velbastað – gamli bygdavegurin millum býligarnar norðuri á Heyggi og úti á Heyggi umframt gøtuljós – 8 mió.kr.
- Kollafjørður: Byggja nýggjan barnagarð í Kollafirði – hóskandi stødd til barnatal – 10 mió.kr.
- Fleiri aktivitets- og fríðtíðartilboð til pensjónistar í høvuðsstaðnum

Ein leyslig meting av kostnaðinum til størri íløgur vísir, at talan verður um íløgur fyri 600-800 mió.kr. eitt komandi 8 ára tíðarskeið – treytað av ambitiónstøðinum. Afturat hesum koma smærri ætlaðar og óvæntaðar íløgur, sum eisini eru neyðugar fyri at menna øll økini í kommununi.

Tað er umráðandi at seta upp samlaðu búskaparligu ávirkanina, tá íløgur verða framdar og settar í rakstur – tað vit kunnu kalla *totalbúskapur* – útreiðslur til íløgur og leypandi rakstur.

**Tiltøk**
- Langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur
- Vakstrarætlan
- Økismenningarætlan

## Politiskar raðfestingar

Tórshavnar Kommuna arbeiðir við at fyrireika nógvar íløgur og verkætlanir – nakrar av verkætlanunum er rímuliga ítøkiligar, meðan aðrar meira eru á einum hugskotsstøði. Tað er trupult at fylgja við, hvussu hesar verkætlanir verða raðfestar og nær nakrar av hesum verkætlanum yvirhøvur kunnu gerast veruleiki.

Tí verður neyðugt, at kommunan fer undir at gera eina langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur. Ein slík ætlan skal verða við til at tryggja, at menningin kann fara fram undir skipaðum og fíggjarliga tryggum umstøðum, og í einum jøvnum tempo. Ein slík ætlan er eisini ein neyðug fortreyt fyri, at tað yvirhøvur skal bera til at gjøgnumføra nógvu verkætlanir.

Ein langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur skal knýtast saman við einari Vakstrarætlan og einari Økismenningarætlan.

# ONNUR POLITISK MÁL

Politiskar raðfestingar

Sambandsflokkurin heldur, at sjálvt um nøkur málsøki, við verandi útgangsstøði í kommununi og vinnuni, verða raðfest hægri enn onnur øki í einum komandi samgonguskeiði, so er eisini týdningarmikið politiskt og umsitingarliga at arbeiða við teimum málum, sum nevnd eru samlað undir Onnur politisk mál. Hesi mál stuðla m.a. undir fokusøkini, sum lýst eru frammanfyri.

## ALTJÓÐAGERÐ

Føroyska samfelagið, Tórshavnar Kommuna og vinnan hava í fleiri ár merkt ávirkanina frá altjóðagerðini – nakrar tillagingar hevur altjóða samfelagið kravt, at vit seta í verk, meðan aðrar tillagingar eru gjørdar av egnum áhuga og vilja.



Tað eru ein røð av krøvum og møguleikum, sum kommunan framhaldandi fer at standa yvirfyri. Vit kunnu tosa um inn- og útgangandi altjóðagerðing.

Málsetningar

Tað fylgir ein serlig ábyrgd við heitinum at verða høvuðsstaður í einum landi. Tí er tað eisini eitt serligt krav til Tórshavnar Kommunu at gera tað, sum er neyðugt fyri at liva upp til heitið ein høvuðsstaður á altjóða støði – og um neyðugt gerast í samstarvi við landsins myndugleikar.

Tórshavnar Kommuna eigur alsamt at taka lut í altjóða samstarvi og gerast partur av altjóða avtalum, sum hava til endamáls at broyta og menna kommununa og vinnuna.

Tiltøk

- Styrkja kommunalt samstarv við útlendskar kommunur – eitt nú á umhvørvisøkinum, grøn orka o.a.
- Upplýsandi átøk um Føroyar og føroyska vinnu – Tórshavn sum íløgubýur og ferðamál

## UMSITING OG BYGNAÐUR

Málsetningar

Umsitingin er vorðin ov stór – vokseværk við trupulleikum at tryggja dygdargóða planlegging, stýring, samskipan og eftirlit.

Spurningurin er um umsitingin veitir tað tænastu, sum borgarin væntar í mun til, hvat henda kostar og til tann útreiðslurvøkstur, sum er farin fram seinastu 8-10 árini.

Sambandsflokkurin heldur, at ein týðandi partur av møguleikunum at skapa fleiri og dygdarbetri úrslit í politisku skipanini er størri dynamikkur í politiska arbeiðinum. Politikarar skulu gerast betri at brúka umsitingina effektivt í teirra politiska arbeiði umframt at verða betri til at taka til sín altjóða rák um menning. Við hesum verður størri trúvirðið og álit á politiska arbeiðinum.

<u>Tiltøk</u>

- Brúkarin verður settur í fokus – einfaldar og greiðar mannagongdir – ein inngongd til kommunalu skipanina (td. hugskotið við Snarskivuni)
- Málsviðgerðartíðir styttast munandi – vanlig mál sum td. byggiloyvir avgreiðast innan tríggjar vikur
- Deildir og funktiónir verða lagdar saman – betri samskipan, hægri dygd og lægri útreiðslur
- Kommunalir stovnar, deildir ella funktiónir verða lagdar saman, har uppgávurnar líkjast og náast kunnu nakrar ítøkiligar synergieffektir – fakliga, tænastuliga og búskaparliga
- Nýggir stovnar, deildir ella funktiónir verða settar á stovn í tann mun hetta tænir einari vinnuligari vakstrarætlan og vælferðini – hetta er eisini galdandi fyri at styrkja verandi stovnar
- Uttan ein ítøkiligan tørv á tænastum verða stovnar tiknir av ella skerdir
- Menna førleikarnar í umsitingini bæði hjá leiðslu og starvsfólkum

## BUSSLEIÐIN

<u>Málsetningar</u>

Tórshavnar Kommuna hevur valt at skipa býarflutning við bussum ókeypis fyri øll ferðandi. Bussleiðin kostar kommunukassanum árliga umleið 22 mió.kr. (FÆ 2012).

Hetta hevur við sær, at eisini tey sum ikki gjalda skatt til felags kommunukassan brúka henda ókeypis flutning – her verður serliga hugsað um turistar og onnur ferðandi. Avleiðingin av hesum er m.a. at hyruvognar missa pening og inntøkur vegna henda kappingaravlagandi flutning.

<u>Tiltøk</u>

- Endurskoða flutningsskipanina

## UMHVØRVI

Málsetningar

Umhvørvið hevur staðið á politisku dagskránni í nøkur ár og roynt hevur verið at seta mál um at minka um dálkingina frá olju, burturkasti o.ø. dálkandi evnum og tilfari. Harafturat eru settar í verk skipanir og gjørdar íløgur fyri at minka um dálkingina, v.m.ø. bjálving, brennistøðir, hitapumpur, og við at brúka vatn- og vindorku.

Sambandsflokkurin hevur sum mál, at Føroyar og høvuðsstaðurin framhaldandi arbeiða við at minka um útlát og umhvørvisdálking og gerast eitt undangonguland á hesum økinum við grønari orku.

Tiltøk

- Havnin gerst partur av altjóða avtalum og skipanum um umhvørvisátøk
- Upplýsandi tiltøk verða sett í verk um orkusparing og burturkast
- Skipanir til burturkast verða mentar og útbygdar

## BÚSTAÐIR

Málsetningar

Bústaðarmarknaðurin í Føroyum er ov stirvin og einstáttaður og grundaður á langar siðvenjur. Harafturat er tað sera kostnaðarmikið fyri eina vanliga familju at byggja egin hús.

Sambandsflokkurin hevur sum mál at gera bústaðarmarknaðin meira liðiligan, bíligari og skapa fleiri møguleikar til fólk, sum td. velja at flyta til Føroya og høvuðsstaðin at seta búgv, umframt at skapa bústaðarmøguleikar til yngri lesandi, eldri og aðrar málbólkar.

Tiltøk

- Skipanir og lóggáva, sum kann viðvirka til fjølbroytni innan bústaðarbygging – skapa ávirkan
- Menna fíggingarmøguleikar
- Útstykkja byggiøki

## UNGDÓMUR

Málsetningar

Føroyar eru eftirbátur, tá talan er um at gera ein samlaðan innsats fyri teimum ungu. Flestu lond hava ein ungdómspolitikk, sum savnar og samskipar innsatsin mótvegis børnum og ungum, men í Føroyum verður førdur ein málsuppbýttur politikkur. Td. verða bústaðarviðurskifti hjá ungum, útbúgvingarmøguleikar og frítíðartilboð viðgjørt hvørt sær, sjálvt um økini hanga tætt saman. Um so er, at lesandi hava vánaligar bústaðir ella skúlar,

so ávirkar tað teirra trivna og møguleikar fyri at tilogna sær nýggja vitan til gagns fyri framtíðar vælferðarsamfelagið og vinnuna.

Sambandsflokkurin vil virka fyri, at onki ungdómsarbeiðsloysið er í Tórshavnar Kommunu.

Tiltøk

- Hóskandi, fjølbroyttir og bíligir bústaðarmøguleikar
- Fólk við serligum tørvi eiga at fáa serlig skúlatilboð
- Saman við vinnuni virka fyri at sett verða á stovn fleiri læarupláss

# **VALEVNI –** kommunuvalið 2012


1. Annfinn Brekkstein


2. Anja Rein


3. Hanus Midjord


4. Helgi Fossadal


5. Høgni Mikkelsen


6. Jóhan Petur Johannesen


7. Jón F. Johansen


8. Jóna M. Mortensen


9. Júst Rubeksen


10. Maibrith A. Hansen


11. Oddvør Johannesen Mohr


12. Reidar Jacobsen


13. Ronald F. Poulsen


14. Tummas Pauli av Reyni